gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Innantóm og óvirðilig fólkaatkvøða

Um somu tíð sum ís lendska Vølvan spáar um fólkaatkvøðuna í Føroyum og fullveldið og sigur, at føroyingar fara at siga ja til hesi bæði, stendur vanligi føroyingurin púra á berum. Neyvan nakar føroyingur veit, hvat ein komandi fólkaatkvøða skal innihalda og í hvønn mun hon skal binda øll komandi ættarlið til eina ávísa politiska kós. Løgmaður veit tað heldur ikki og sær tað ikki mætari út enn, at hann skal brúka allan januar mánað eisini til at finna út av hesum. Við øðrum orðum fáa føroyingar bara ein til tveir mánaðir at umhugsa seg og taka støðu til framtíðina hjá sær og sínum børnum. Fólkaatkvøðan skal nevniliga vera í apríl.

Útmeldingarnar frá landsstýrinum eru eisini sera ymiskar og jánkasligar. Hetta er heldur ikki so løgið og man neyvan undra nakran. Tí øllum kunnugt varð semjan, sum landsstýrisflokkarnir gjørdu við fólkaatkvøðu sum loysunnarorði einki minni enn ein sjónleikur, sum hvørki samgonguflokkarnir sjálvir ella nakar annar trýr veruliga uppá. Tá samgongan hevði rent seg fasta í fullveldisgongdini og flokkarnir innanhýsis vóru rúkandi ósamdir eydnaðist tað tó túsundkunstnararanum í Tinganesi, sjálvum formanni Tjóðveldisfloksins í evstu løtu at finna uppá. Og harvið bjargaði hann samgongu og sær og sínum. Hann megnaði at fáa eina loysn, sum hvørki var fuglur ella fiskur. Í veruleikanum ein totalkapitulering og afturvendan til gamlan fólkafloks- og sjálvstýris- stig fyri stig politikk. Nýggja barnið kom at eita semja um fólkaatkvøðu, men hóast fleiri mánaðir eru gingnir síðani hetta varð almannakunngjørt, veit Føroya fólk enn ikki, hvat samgongan vil og ætlar við fólkaatkvøðuni.

Mannagongdin í hesum máli hevur ódemokratisk og ósømilig. Tí fyrst at lappa uppá eina samgongu við lyfti um fólkaatkvøðu fyri síðani ikki at vita, hvat henda atkvøða skal snúgva seg um, fyrr enn beint undan henni, er einki mætari enn at spæla hasard og at halda veljararnar fyri spott. Var nøkur meining í eini fólkaatkvøðu, so høvdu landsstýrisflokkarnir fyri langari tíð síðani havt gjørt sær greitt, hvat hon skal innihalda.

Føroyingar standa sum kánus og bíða eftir at ósamdir politikarar í eini samgongu, sum alla tíðina er í innanhýsis stríði, skulu koma ásamt um, hvat ein fólkaatkvøða um fólksins framtíð skal innihalda. Tað einasta rætta soleiðis sum støðan er vorðin, er at lata veljaran tala við eitt komandi val. Ja ístaðin fyri eina fólkaatkvøðu í apríl átti løgmaður heldur at skriva út nýval, hvørs valstríð so kundi snúð seg um, hvat ein komandi fólkaatkvøða skal innihalda. Samgongan vil gera tað júst øvugt. Ikki fyri fólksins skuld men fyri sína egnu skuld. Fyri at varðveita maktina. Hetta er ódámligt.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Gullbrúdleyp





Nýggjársaftan hava hjúnini Palma og Bjarni Dal-Christi-ansen í Havn gullbrúdleyp.

Palma er fødd og uppvaksin á Skála og er yngst av 12 systkjum. Foreldur hennara vóru Jóhanna, fødd Gregersen úr Gøtu og Petur Rasmussen, Petur í Uppistovu av Skála.

Palma kom longu sum 15 ára gomul til Havnar. Hon gekk á Handilsskúla og tænti m. a. hjá Anmnu Sam, var í handlinum hjá Hans Joensen, í Smæruni og hjá Katrinu Christiansen. Í nógv ár handlaði hon sjállv úti í Jóannesar Patursonargøtu, síðani fór hon aftur til Katrinu Christiansen, áðrenn hon fór at arbeiða í Litbrá, har hon var í sekstan ár. Tey mongu, ið hava keypt frá Palmu, minnast, hvussu væl alt var fyriskipað hjá henni, hvussu blíð, fyrikomandi og hjálpsom hon altíð var.

Bjarni er havnarmaður. Føddur og uppvaksin í Tórsgøtu í Havn, har Restaurant City nú er. Hann er sonur Paulinu Dal-Christiansen og Sophus Christiansen, vanliga nevndur Sophus skómakarin, bæði úr Havn.

Bjarni hevur alla sína tíð starvast sum bilførari. Byrjaði sum heilt ungur at koyra hýruvogn og var við til at stovna Auto, har hann koyrdi í nógv ár. Koyrdi í nøkur ár skúlabørn av Hvítanesi til Havnar og koyrdi eisini í fleiri ár rutukoyring millum Havnina, Kirkjubø og Velbastað, og sigast má um hann, at hann hevur verið sera røkin í sínum starvi.

Fyrst í 70'unum vóru tey umleið eitt ár í Danmark, Palma var í einum skógvahandli á hvidovrevej og Bjarni starvaðist hjá Skandinavisk Tobakskompagni, hetta var ein góð tíð, og minnast tey ofta aftur á tíðina á Rebæk Søpark.

Palma og bjarni eru nú bæði pensjónistar, men frísk og væl fyri, og teimum dáma væl at vera um børnini, Annelin og kára, og tey fimm ommu- og abbabørnini.

Dagurin verður hildin heima frá kl 9-14, har øll, ið vilja heiðra gullbrúðarpari1ð, eru vælkomin.



*Bergur Hansen, djóralækni*



*Heri Joensen, prestur*



*Heri Kragesteen, sálarfrøðingur*



*Ingi Højgaard, løgfrøðingur*



*Jens Andreassen, lækni*



*Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu/húsarhaldsfrøðingur*



*Jón Klein Olsen, politistur*



*Jón Kragesteen. Ferðslutrygd*

## Spyrjið serfrøðingarnar

Adressan:
Sosialurin,
box 76,
110 Tórshavn,

Fax 314720
ella teldupost:
spyr@sosialurin.fo

– og merkið, hvørjum tit seta spurningum.



*Julianna Næs, pedagogur*



*Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi*



*Turid Thomsen, lestrarvegleiðari*



*Marius Staksberg, málfrøðingur*

**Svarini verða prentað í blaðnum mikudag**

†

Kunngjørt verður at kæra mamma mín
og systir okkara

**Gunnhild Gudmundsdóttir Isfeldt,**

doyði í Skien í Noreg, jóladag 53 ára gomul.
Jarðarferðin verður í dag úr Solum Kirke
í Skien.

*Vegna tey avvarðandi*
**Gudmund**

## Tøkk

Eina hjartans tøkk vil eg senda tykkum mongu, sum mintust meg á áttati ára føðingardegnum hin 13. desember, við ynski um eini gleðilig jól og signing Guds yvir nýggja árið.

**Niels Pauli Sigurheim**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult cyan magenta svart



# Dagrøktarmammur: Vandi fyri verkfalli á nýggjárinum

**– Landsstýrið vil ikki góðkenna sáttmálarnar, sum eru gjørdir ímillum Føroya Arbeiðarafelag og kommunurnar um dagrøktarmammur kring landið. Sostatt er sáttmálaloysi 1. januar og tað vænta fleiri, fer at raka samfelagið hart**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*



*Tað er nógv sum bendir á, at dagrøktarmammurnar kring alt landið fara í verkfall fyrst í januar. Landsstýrið ikki góðkenna sáttmálarnar og sostatt er sáttmálaloysi. Hetta fingu vit ikki at vita fyrrenn í síðstu viku og tað er átaluvert, sigur bygdaráðsformaður, sum hevur gjørt sáttmála um dagrøkt.*

*Myndin er tilvildarlig*

Tað er nú nógv, sum bendir á, at tað verður ongin barnaansing í tí mesta av landinum aftaná 1. januar- ella í hvussu so er stutt eftir tað.

Orsøkin er, at fíggjarmálastýrið í landsstýrinum vil ikki góðkenna sáttmálan, sum er gjørdur ímillum Føroya Arbeiðarafelag og kommunurnar.

Sáttmálin skuldi annars koma í gildi nú 1. januar. Áður hevur ongin sáttmáli verið á økinum, so tá ið sáttmáli varð gjørdur í heyst, var hetta fyrstu ferð, at hesin bólkurin í samfelagnum fær skipað viðurskifti.

Men tá ið landsstýrið ikki vil góðkenna sáttmálan, kann hann ikki setast í gildi.

– Sostatt er framvegis sáttmálaloysi tann 1. januar, sigur Eivind Jacobsen, bygdaráðsformaður á Strondum, sum er rættiliga argur inn á landsstýrið um framferðina í hesum máli.

Hann væntar at tað verður trupult at fáa dagrøktarmammurnar til arbeiðis, uttan at sáttmáli er komin í gildi. Og tí væntar hann eisini, at tær fara at leggja arbeiðið niður og sostatt er ongin barnansing eftir fyrsta januar.

Ella í øllum førum roknar hann ikki við, at tað fara at ganga nógvir dagar av nýggja árinum, áðrenn dagrøktarmammurnar fara at niðurleggja arbeiðið.

Ingeborg Vinther vil ikki gera so nógvar viðmerkingar til málið. Boðini frá landsstýrinum um, at tað ikki kann góðkenna sáttmálan, eru so nýggj, at hon hevur ikki fingið sett seg ordiliga inn í málið.

Men eisini hon væntar, at tað verður trupult hjá dagrøktunum at fara til arbeiðis við ongum sáttmála.

– Tað er í øllum øfrum greitt, at hetta fer at fáa álvarsligar avleiðingar, sigur IngeborgVinther.

### Svar í síðstu viku

Eivind Jacobsen, sigur, at sáttmálin ímillum Sjóvar Kommunu og Føroya Arbeiðarafelag samráddust um nýggjan sáttmála, áðrenn sáttmálin varð gjørdur ímillum Føroya Arbeiðarafelag og arbeiðsgevarafelagið hjá kommununum og ímillum Føroya Arbeiðarafelag og tær størru kommunurnar.

Men allir sáttmálarnir eru at kalla eins.

Og nú hava bæði Sjóvar Kommuna og allar hinar kommunurnar, sum hava sáttmála við Føroya Arbeiðarafelag, fingið at vita frá landsstýrinum, at sáttmálin kann ikki góðkennast.

Eivind Jacobsen sigur, at tað var longu fyrst í november, at hann sendi fíggjarmálastýrinum sáttmálan til góðkenningar.

Men svar kom onki fyrrenn í síðstu viku - nakrar fáar arbeiðsdagar, áðrenn hann skuldi koma í gildi.

– Hetta er langt úti. Hetta minnir mest um eina roynd at leggja trýst á okkum um at góðtaka krøvini hjá fíggjarmálastýrinum, tí tað er sálvsagt, at tað ber ikki til at gera nógv til 1. januar. Bygdaráðsformaðurin á Strondum sigur, at tað eru fleiri øki í sáttmálanum, sum Landsstýrið ikki vil góðkenna.

– Í fyrsta lagi vil landsstýrið ikki góðkenna sjálva lønina. Eftir sáttmálanum skulu dagrøktirnar fáa 2.947 krónur um mánaðin fyri hvørt barnið, men landsstýrið vil ikki góðkenna, at tær fáa meiri enn 2.720 krónur, ella 227 krónur færri.

– Eg dugi ikki at síggja, hví landsstýrið skal leggja seg út í hetta, tí kommunurnar gjalda alt samalt sjálvar.

– Harafturat vil landsstýrið ikki góðkenna, at dagrøktarmammurnar skulu hava frí 1. mai. Landsstýrið heldur, at tað er óheppið, at tær hava frí, tá ið flest øll onnur eru til arbeiðis. Landsstýrið heldur, at hetta fer at noyða nógv av teimum, sum hava børn í dagrøkt, eisini at taka frí 1. mai.

Hetta skilir Eivind Jacobsen heldur ikki.

– Dagrøkt er ein tænasta, vit veita borgarunum. Og um vit ikki kunnu veita hesa tænastuna 1. mai eisini, hevur tað onki við landsstýrið at gera.

Tað eru eisini aðrir partar í sáttmálanum, sum landsstýrið ikki vil góðtaka.

Bygdaráðsformaðurin sigur, at hann skilir ikki, hvat landsstýrið yvirhøvur hevur við hetta málið at gera, tí tað eru kommunurnar, sum betala hvørt oyra.

– Men landsstýrið hevur lógir at vísa til og krevur, at tað skal góðkenna sáttmálarnar, sigur Eivind Jacobsen.

### Ongin viðmerking

Í landsstýrinum er ongin av teimum til arbeiðis, sum hava við málið at gera, so haðani fekst ongin viðmerking til málið.

# Útseta sáttmálan ein mánaða

**Petur Kruse, formaður í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, væntar ikki, at dagrøktarmammur fara at leggja arbeiðið niður, hóast landssýrið ikki vil góðkenna teir nýggju sáttmálarnar**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

– Eg vænti ikki, at tað verður verkall á nýggjárinum.

Tað sigur Petur Kruse, sum er formaður í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Í heyst vórðu sáttmálar á fyrsta sinni gjørdir ímillum Føroya Arbeiðarafelag og kommunurnar kring alt landið um dagrøktarmammurnar.

Hetta er ein sáttmáli, sum fevnir um dagrøktarmammurnar í øllum landinum, uttan í nøkrum einstøkum kommununum, har tær eru undir Starvsmannafelagnum, eitt nú í Havn,í Klaksvík og í nøkrum einstøkum kommunum afturat.

Men sum tað sæst aðrastaðni í blaðnum, hevur landsstýrið nú boðað frá, at tað kann ikki góðkenna sáttmálan.

Bæði Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag og onnur, vænta, at tað verður trupult at fáa dagrøktirnar til arbeiðis eftir nýggjár við ongum sáttmála.

So svartskygdur er Petur Kruse, formaður í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, ikki.

Hann heldur ikki, at støðan eftir 1. januar kann kallast sáttmálaloysi sum so, tí í løtuni er ongin sáttmáli og hetta er fyrstu ferð, at sáttmáli skal setast í gildi á økinum yvirhøvur

– Sostatt verður støðan bara óbroytt eftir 1. januar, sigur hann.

Hann væntar tí heldur ikki, at hetta fer at føra til arbeiðssteðg.

– Eg vænti, at dagrøktarmammurnar fara at halda fram sum higartil, eisini eftir 1. januar. So mugu vit brúka januar mánaða til at fáa viðurskiftini í rættlag og at fáa sáttmálan snikkaðan til, so at landsstýrið kann góðkenna hann. Sáttmálin kann so koma í gildi 1. februar ístaðin. Sostatt er bara talan um at útseta hann í ein mánaða, sigur hann.

– Um støðan, sum hon er í løtuni, varar ein mánaða afturat, átti ikki at gjørt tann stóra skaðan, leggur Petur Kruse afturat.

Men hann sigur, at sum støðan er í løtuni, verður hann noyddur at boða kommununum frá, at sáttmálin kann ikki setast í gildi 1. januar, sum ætlað.

Hann sigur, at tá ið farið varð undir samráðingarnar, kannaðu tey málið og fingu at vita, at landsstýrið skal góðkenna allar sáttmálarnar.

– Tí stendur tað í sáttmálanum ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Arbeiðarafelagið, at teir koma í gildi, treytað av, at landsstýrið góðkennir teir.

# Hava ikki sent sáttmálan inn

**– Landsstýrið skal undir øllum umstøðum góðkenna sáttmálarnar fyri dagrøktirnar**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

Sáttmálarnar, sum dagrøktirnar hava fingið við tær ymsu kommunurnar eru eitt sindur ymiskir. Men í øllum førum er tað greitt, at landssýrið skal góðkenna teir.

Tað sigur bygdaráðsformaðurin á Strondum, Eivind Jacobsen.

Hann sigur, at tað stendur í øðrum løgtingslógum, at landsstýrið skal góðkenna teir og so er tað líka mikið, hvat stendur í sáttmálunum. Tí sendu strandingar fíggjarmálastýrinum sáttmálan til góðkenningar, hóast tað ikki stendur í honum, at landsstýrið skal góðkenna hann.

Samstundis eru sáttmálarnir ímillum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Arbeiðarafelag eisini sendir landsstýrinum til góðkenningar. Men í teimum stendur tað beinleiðis, at landsstýrið skal góðkenna teir.

– Landsstýrið hevur boðað okkum frá, at tað skal góðkenna allar sáttmálar, sigur Peter Kruse, formaður í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum. Tí stendur tað í teimum, at teir koma í gildi 1. januar, treytað av, at landsstýrið góðkennir teir.

Men sum tað sæst aðrastaðni í blaðnum, vil landsstýrið ikki góðkenna sáttmálarnar. Sostatt er sáttmálaloysi og fleiri, sum hava við málið at gera, vænta, at tað fer helst at fáa avleiðingar

### Senda ikki inn

Í Vági, sum er ein av teimum størru kommununum, hava tey eina heilt aðra áskoðan.

Vágur er ikki í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, men hevur samráðst við Føroya Arbeiðarafelag saman við fýra øðrum størum kommunum, sum heldur ikki eru limir.

Jógvan Krosslá, býráðsformaður, sigur, at í teirra sáttmála, stendur, at hann verður settur í gildi, treytað av, at býráðið góðkennur hann.

– Tað stendur onki í sáttmálanum hjá okkum um, at landsstýrið skal góðkenna sáttmálan. Tí hava vit heldur ikki sent teimum hann til góðkenningar, sigur Jógvan Krosslá.

Alt hetta kundi bent á, at støðan er rættiliga fløkt í løtuni og spurningurin er tí eisini, sum sáttmálin hjá vágbingum yvirhøvur hevur gildið, tá ið landsstýrið ikki hevur góðkent hann, hóast onki stendur í sáttmálanum um tað.

Og sum nevnt aðrastaðni, eru tey fólkini í landsstýrinum, sum hava við hetta málið at at gera, ikki til arbeiðis.